## Fyrilestur um hvussu børn lesa



Nú heystið er komið fer Klaksvíkar Bókasavn aftur undir at skipa fyri ymsum tiltøkum, tað fyrsta verður týskvøldið 18. September, klokkan 19.30. Tá fer Solveig Debess at greiða frá lesivanunum hjá føroyskum børnum. Í samband við útbúgving sína sum master í barnabókmentum hevur Solveig Debess gjørt eina umfatandi kanning av lesivanunum hjá føroyskum skúlabørnum. Millum annað samanber kanningin úrslitið við støðuna í okkara grannalondum, og tað vísir seg, at føroysk børn lesa minni enn børnini í londunum rundan um okkum.

## 14. September í Vestmanna

Fríggjakvøldið skipa tjóðveldisfeløgini báðu megin Sundalagið fyri 14. September haldið í Fjørukrónni í Vestmanna. Bergtóra Høgnadóttir Joensen og Tórbjørn Jacobsen fara at røða um politisku framtíðina, og Heidi Petersen fer at leggja fram nýggju vangamyndina hjá Tjóðveldinum. Gøtumaðurin í Sandavági, Petur Pólson, fer at lesa yrkingar upp, sum hann sjálvur hevur yrkt. Reimund Nielsen skipar fyri felagssanginum og Jonhard Mikkelsen verður fundarstjóri. Øvugta sjónarmiðið fer sambandstingmaðurin í Norðstreymoy, Olav Enomoto, at standa fyri.

# Ráðgevi rópar v

**Vit liva ikki upp til endamálið í fólkaskúlalógini um, at øll børn skulu hava møguleika at læra, tá ein stórur partur av børnunum dagliga verða happað. Føroyski trivnaðarráðgevin, Anna Dalsgaard, rópar varskó og sigur, at skúlin manglar tíð, pengar og krøv til trivnaðin hjá børnunum**

HAPPING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í Svøríki kann ein skúlastjóri saksøkjast, um skúli hansara ikki stegðar happing av einum barni. Umframt floksins tíma hava svensku skúlarnir eisini ein undirvísingartíma hvørja viku í kensluligum skynsemi, og allir svenskir skúlar hava væl skipað stuðulstoymi, sum tryggja trivnaðin í gerandisdegnum.

Í Føroyum verða skúlaleiðslur eggjaðar til at viðgera happing, men tað er onki krav. Kanningar eru gjørdar, sum vísa happing millum børn og tunglyndi millum ungdómar, men landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sagt, at tað er ov dýrt at innføra floksins tíma aftur í skemaðið. Onkrir lærarar brenna fyri at fáa børnini at trívast, men ongin yvirskipað trivnaðarætlan er fyri føroyska skúlaverkið, og í Føroyum siga tríggjar ferðir so nógv børn seg verða happaðan sum í Svøríki.

Føroyska Anna Dalsgaard hevur fyri stuttum verið í Svøríki og fingið sær praktiskan íblástur til sítt arbeiðið sum trivnaðarráðgevi. Og eftir at hava verið nakrar mánaðar á svenskum skúla, er tað næstan skelkandi at koma aftur til føroyska veruleikan.

Føroyska tosið um at uppraðfesta tað fakliga í mun til trivnaðin, heldur hon vera púra burturvið, tí tingini kunnu ikki skiljast sundur. PISA kanningin kann ikki standa einsamøll, men má viðgerast saman við nýggju kanningunum um happing og tunglyndi, og hon er eisini samd við Stig I. Sørensen, sum Sosialurin hevði samrøðu við í gjár, um at arbeiðið ímóti happing má rótfestast í føroysku skúlaskipanini.

Føroyska fólkaskúlalógin sigur, at øll skulu hava møguleika at læra. Men vit liva ikki upp til hesa lógina, heldur Anna Dalsgaard, tá meira enn sjeyndi hvør næmingur líður undir happing. Tí hesi børn hava ikki møguleika at læra.

- Tá landsstýrismaðurin legði úrslitini frá happingarkanningini fram, virkaði hann næstan uppgevandi, tá hann segði, at arbeiðið móti happing hevði stóran týdning, men vit hava ikki ráð til at innføra floksins tíma. Hann kom ikki við nakrari konkretari ætlan fyri, hvat kann og skal gerast, sigur Anna Dalsgaard, sum just heldur tað verða altavgerandi, at konkret tiltøk verða sett í verk.

### Ólógligt at happa

Anna Dalsgaard varð útlærd sum lærari í 1993 og hevur arbeitt sum lærari í Havn og Keypmannahavn. Í 2001 tók hon diplomútbúgving í sálarfrøði frá Dansk Pædagogisk Universitet, og hetta seinasta árið hevur hon millum annað verið á einum fólkaskúla í Malmø fyri at kanna, hvussu tey arbeiða við trivnaðinum har.

- Svøríki er eitt undangonguland, tá tað kemur til trivnað og stríðið móti happing, greiðir Anna Dalsgaard frá.



Í Svøríki eru tann sosiali hugburðurin so inngrógvin í skúlaskipanina, at tað ongantíð er ein spurningur, hvørt tað fakliga skal viga meira enn trivnaðurin ella øvugt. Har tykast øll sannførd um, at um tú ikki hevur tað gott, so lærir tú ikki, sigur hon. Svenska fólkaskúlalógin tilskilar greitt, at happing ikki er loyvd í skúlanum. Soleiðis er hvørki í Danmark ella Føroyum. Og svenskir skúlastjórar hava ábyrgd fyri, at henda lóg verður hildin á teirra skúla. Um okkurt mál um happing tekur seg upp, skulu teir prógva, at okkurt verður gjørt við málið, annars kunnu teir saksøkjast. Hetta er eisini hent nakrar ferðir, og skúlastjórar eru dømdir.

- Hetta skapar ábyrgdarkenslu báðar vegir, greiðir Anna Dalsgaard frá. Politikararnir hava ábyrgd fyri at taka hetta øki í álvara og játta pengar til arbeiðið móti happing, og lærarar og skúlamyndugleikar hava greiða ábyrgd at tryggja trivnaðin hjá børnunum.

Men í Føroyum lata vit tilvildina ráða, heldur føroyski trivnaðarráðgevin. Landsstýrismaðurin sigur, at skúlarnir hava pengar at brúka til tað sum teir meta hevur týdning, og so roknar hann við at teir taka happing í álvara. Men hetta, staðfestir Anna Dalsgaard, er ikki